# Frágreiðing til aðalfundin hjá Svimjisambandi Føroya




Fyri tíðarskeiðið 23. mars 2023 til 13. apríl 2024

# Felagsskapurin

## Starvsnevnd

Hetta árið var starvsnevnd SSF: Rókur í Jákupsstovu, formaður, Johan Martin Thorsteinsson, næstformaður, Gunnvá Thomsen, skrivari, Sabina Poulsen og Dann Hjelm, nevndarlimir, umframt Hálvdan Rúni Gaardbo, tiltakslimur. Starvsnevndarfundir hava verið umleið eina ferð um mánaðin.

Dann Hjelm hevur í sambandi við hendan aðalfund fráboðað, at hann ynskir ikki at taka við afturvali, og vilja vit hervið takka honum fyri hansara tíð í starvsnevnd SSF. Vónandi verður hann ikki alt ov langt burturi; tí ofta hevur verið brúk fyri honum.

## Svimjinevnd

Hetta árið hevur svimjinevndin verið: Bjørg O. Jensen, forkvinna, Jón Bjarnason, næstformaður og Rakul A. Dam, skrivari/nevndarlimur. Eitt skifti var Astrid Joensen eisini í nevndini.

Svimjinevndin tekur sær av heimligu kappingunum, umframt spurningum ísv kappingarreglur SSF.

## Dómsnevnd

Hetta árið var dómsnevnd SSF: Anni á Hædd, forkvinna og Jórun Eið Johannesen, nevndarlimur.

Hesa tíðina var eitt mál í fleiri umførum hjá dómsnevndini at viðgera. Áhugaði kunnu lesa her.

## Dómarar

Útbúnu yvirdómarar SSF eru: Dann Hjelm, Elin Matras, Katja Lervig, Thurid Kjærbo, Annika N. Johannesen og Hálvdan Rúni Gaardbo. Av hesum eru Dann Hjelm, Katja Lervig og Hálvdan Rúni Gaardbo altjóða yvirdómarar. Erling Eidesgaard og Eyðun Húsgarð eru altjóða startarar.

Altjóða yvirdómararnir og startararnir fingu endurnýggjað sína góðkenning á vetri 2022, so at tey eru góðkend av altjóða svimjisambandinum World Aquatics (AQUA, fyrr FINA), fram til árslok 2026. Í 2023 umboðaðu altjóða yvirdómararnir okkum Rúni á EJM og Katja og Dann á EM U23.

Tað er tørvur á fleiri yvirdómarum, og eru vit tí farin í samstarv við Dansk Svømmeunion, um útbúgving av dómarum. Á heysti 2023 tók Rakul í Lágabø útbúgving sum yvirdómari, og eri hon harvið komin afturat okkara yvirdómarahóp.

## Svimjiskúlin

Hálvdan Rúni Gaardbo, Pálin Olsen og Jórun Eið Johannesen eru oddafólk í Svimjiskúla Føroya, umframt at vit hava onnur afturat útbúgvin til at kunna undirvísa í skipanini. Hetta árið hevur verið lítið virksemi, tó so at áhugaverdir møguleikar eru at gera samstarv við Fróðskaparsetrið.

## Lívbjarging

Svimjisambandi endurnýggjaði á heysti 2022 lívbjargingarskipan okkara, tá ið 10 fólk tóku prógv sum lívbjargingardómarar í skipanini hjá SvømDanmark. Hesi 10 skulu m.a. hvørt ár hava minst 5 lívbjargarar upp til roynd, og megnaðu øll hetta í 2023. Sólgerð M. Joensen samskipar átakið.

## Landsliðsvenjari og -toymi

Hin 1. juni 2021 varð Kristian Martin Joensen settur sum landsliðsvenjari SSF, við uppgávu at skipa fyri landsliðslegum her í Føroyum, at fara við landsliðum til uttanlanda uppgávur, og sum heild at leggja ætlanir fyri landsliðsvirksemi okkara, í samráð við venjarar í feløgunum.

Í fyrstanini órógvaði korona nógv, umframt at finna pláss fyri legunum í kalendaranum. Men, eftirhondini er hetta komið í eina rímiliga fasta legu, har 1-3 legur eru hvørt hálvár eisini fyri talent.

Á sumri 2023 spíraðu tankarnir um eitt landsliðstoymi, og gjørdu vit tá nakrar royndir við fólki afturat Kristian Martini, sum endaðu við avtalu við Rúnu Jakobsen og Rúna Gaardbo.

Gongd er so smátt komið á ynskta talentlandsliðsvirksemið, við luttøku á Sumarmót Íslands í juni 2023, og ungdómslandsliðslegu í Fuglafirði í februar 2024. FS hevur stóra tøkk uppiborið, fyri at hava skipað fyri væleydnaðu leguni í februar.

## Skrivstova, bókhald og aðalskrivari

Hetta árið hevur formaðurin tikið sær av skrivstovuni, við hjálp frá serliga næstformanninum Johan Martin Thorsteinsson, og kassameistaranum Símun Michael Sørensen. Her er í so nógv til okkum at gera í okkara frítíð, og er tað tí átroðknandi at seta fólk til dagliga virksemið.

Eitt nevnivert er goymslan í Saltangará, sum vit við stórum blíðskapi frá Runavíkar kommunu hava til at goyma gamalt umframt stevnuútgerð, merkir og landsliðsbúnar. Her eitt nýtt nú í vetur, at Johan Martin við stuðli frá Jysk hevur skipað klæðini í íløt eftir stødd, so at lættari er at fara eftir teimum.

Hartil, at bókhaldsskipanin í vikuni er uppstigað frá Dynamics NAV 2016 til 365 Business Central.

## Íðkaranevnd

Á SSF aðalfundinum í 2022 varð samtykt at spyrja Pál Joensen og Signhild Rannváardóttir, um tey vildu taka sæti sum fyribils íðkaranevnd hjá SSF, millum annað við uppgávu at skipa fyri vali millum íðkarar til hesa nevnd. Pál var forfólk fyrsta góða árið, til Signhild tók yvir í september 2023.

Á SSF aðalfundinum í 2023 varð fyrsta reglugerð fyri Íðkaranevnd SSF samtykt, ið tey bæði høvdu tilevnað við støði í serliga tilsvarandi reglugerð hjá ÍSF. Síðani var val á heysti í 2023, har tað við leiðbeining frá ÍSF fyrst varð staðfest hvørji ið vildu listast at hava valbæri og valrætt sambært reglugerð SSF, og síðani hvørji ið ynsktu at stilla upp til íðkaranevndina.

Aftaná uppstillingarfreistina kundi staðfestast at tey vóru 4 sum ynsktu at stilla upp, har pláss var fyri 5 í nevndini, og varð úrslitið tí at hesi 4 vórðu nýggja íðkaranevnd SSF: Barbara Debes, Natanael Matras, Rói Bech og Signhild Rannváardóttir. Nevndin skipaði síðani seg sjálva, so at Signhild er forkvinna, Natanael næstforfólk, Barbara skrivari og Rói nevndarlimur.

Nýggja íðkaranevndin fór beinanvegin til verka, og eru áhugaverd tiltøk longu á veg, so sum ætlað gallaveitsla í november 2024.

Vit vilja takka Páli og Signhild fyri teirra stóra arbeiði, at fáa hesa reglugerð og fyrstu veruligu íðkaranevnd í lag. Fyri okkum traditionellu nevndarlimir hevur tað nógv at siga, at hetta arbeiði varð skipað av íðkarum til íðkarar, uttan stórvegis íblanding frá øðrum enn neyðturviliga aðalfundi SSF.

## Felagsskapurin

Afturat okkum sjálvum í nevndum SSF og feløgum, eru nógvar góðar kreftir í svimjingini sum vit dúva uppá, serliga í sambandi við meistarastevnur og landsliðsvirksemi. Hetta er dýrabærur stuðul, ið vit lukkutíð fáa fyri lítið og lætt.

Serliga er árligi kalendarafundurin ein góð kelda til hjálp og konsensus í sambandi við heimligu stevnurnar, umframt nú rímiliga regluligu forfólkafundirnir, ið vit byrjaðu við í 2022.

Árliga svimjiráðstevnan er ikki komin aftur omaná korona, men høvdu vit í staðin ein longri forfólkafund í september 2023, umframt ein stytri í januar 2024, har SSF legði fram sínar ætlanir til forfólkini at kunna gera sínar viðmerkingar til.

## Nýtt svimjifelag

Í oktober 2023 fingu vit fyri fyrstu ferð í nógv ár eitt nýtt svimjifelag, sum er Svimjifelagið Hellufossur í Kvívík. Tey løgdu bragdliga fyri við beinanvegin at taka skeið sum lívbjargarar umframt í Merkjaskipanini, og hava longu vunnið heiðursmerki á barnastevnum. Vælkomin Hellufossur!

## Limir í føroyskum svimjifeløgum

Nú í mars 2024 vóru tað 1258 limir í føroysku svimjifeløgunum, harav 400 í Havnar Svimjifelag (HS), 400 í Ægir, 162 í Svimjifelagnum FLOT, 152 í Suðuroyar Svimjifelag (SuSvim), 72 í Svimjifelagnum Reysta, 42 í Fuglafjarðar Svimjifelag (FS) og 30 í Svimjifelagnum Hellufossur.

Til samanbering vóru tað í fjør 1228 limir í føroysku svimjifeløgunum, harav 400 í Havnar Svimjifelag (HS), 400 í Ægir, 162 í Svimjifelagnum FLOT, 152 í Suðuroyar Svimjifelag (SuSvim), 72 í Svimjifelagnum Reysta og 42 í Fuglafjarðar Svimjifelag (FS).

Í 2022 vóru tey 966 skrásettir limir í føroysku svimjifeløgunum, harav 350 í Havnar Svimjifelag (HS), 278 í Ægir, 133 í Svimjifelagnum FLOT, 113 í Suðuroyar Svimjifelag (SuSvim), 52 í Fuglafjarðar Svimjifelag (FS), og 40 í Svimjifelagnum Reysta.



# Svimjiárið 2022-2023

## AQUA stevnur í føroyskum svimjihallum

Føroysk svimjifeløg og SSF skipaðu hetta svimjiárið fyri 13 AQUA-góðkendum svimjistevnum í svimjihallum, harav 6 meistarastevnum, har málbólkurin vóru føroysk børn, ung og vaksin.

| Stevna | Staður | Dagfesting | Hylur | Kapp. | Feløg | Íðkarar | Lið | Úrslit | AQUA |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| HS Open | Tórshavn | 10.-11.sep.22 | 25m | 41 | 4 | 64 | 21 | 382 | 655 |
| NOM | Tórshavn | 30.sep.-1.okt.22 | 25m | 34 | 35 | 121 | 32 | 464 | 543 |
| Ægir Open | Klaksvík | 22.-23.okt.22 | 25m | 36 | 5 | 85 | 0 | 538 | 756 |
| ABMS Sprint | Klaksvík | 5.nov.22 | 25m | 30 | 5 | 130 | 20 | 605 | 547 |
| FMS/JMS | Tórshavn | 11.-13.nov.22 | 25m | 86 | 5 | 68 | 47 | 594 | 780 |
| SuSvim Open | Vágur | 14.-15.jan.23 | 50m | 36 | 4 | 75 | 18 | 489 | 675 |
| Ægir Open | Klaksvík | 18.-19.feb.23 | 25m | 50 | 5 | 82 | 22 | 571 | 676 |
| HS Open | Tórshavn | 18.-19.mar.23 | 25m | 43 | 5 | 105 | 37 | 631 | 692 |
| Atlantic Open | Tórshavn | 14.-16.apr.23 | 25m | 56 | 5 | 53 | 10 | 437 | 701 |
| HS-stevna | Tórshavn | 22.apr.23 | 25m | 12 | 5 | 135 | 0 | 242 | 482 |
| ABMS | Klaksvík | 6.-7.mai.23 | 25m | 77 | 5 | 145 | 31 | 1121 | 570 |
| SuSvim Open | Vágur | 20.-21.mai.23 | 50m | 38 | 5 | 72 | 15 | 465 | 724 |
| FML/JML | Vágur | 16.-18.jun.23 | 50m | 80 | 5 | 51 | 26 | 561 | 699 |

## Aðrar stevnur í føroyskum svimjihallum

Føroysk svimjifeløg skipaðu hetta svimjiárið fyri 6 stuttleikastevnum, fyri okkara yngstu aldursbólkar: HS-stevna á Argjum hin 8. okt. 22, SuSvim-stevna á Tvøroyri 29. okt. 22, FS-stevna í Fuglafirði 3. des. 22, FLOT-stevna á Toftum 4. feb. 23, SuSvim-stevna í Páls Høll 4. mar. 23 (har tey svumu breiddir), og Reysta-stevna í Leirvík 25. mar. 23.

# Uttanlanda og altjóða stevnur

Landslið SSF luttóku á 8 uttanlanda og altjóða stevnum, hetta svimjiárið, umframt at feløg luttóku í øllum førum á Køge Open 2022 og Reykjavík International 2023, og at Elisabeth Erlendsdóttir og Vár E. Eidesgaard ísv skúla- og venjingaruppihald í USA kappast á 25 yards og 50m-stevnum har.

| Stevna | Land | Dagfesting | Hylur | Íðkarar | Lið | Úrslit | Gull | Silvur | Bronsa | AQUA |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| NM/NJM 22 | NOR | 10.-12.des.22 | 25m | 10 | 3 | 36 | 0 | 0 | 0 | 685 |
| HMS 22 | AUS | 13.-18.des.22 | 25m | 1 | 0 | 2 | 0 | 0 | 0 | 729 |
| DO 23 | DEN | 1.-4.apr.23 | 50m | 13 | 0 | 63 | 0 | 0 | 0 | 731 |
| SMÍ 23 | ISL | 10.-11.jun.23 | 50m | 15 | 3 | 85 | 0 | 2 | 4 | 557 |
| NMU 23 | SWE | 8.-9.jul.23 | 50m | 2 | 0 | 9 | 0 | 0 | 0 | 644 |
| OyL 23 | GBR | 10.-13.jul.23 | 25m | 10 | 9 | 90 | 4 | 11 | 11 | 726 |
| HM 23 | JPN | 23.-30.jul.23 | 50m | 2 | 0 | 4 | 0 | 0 | 0 | 731 |
| EM U23 23 | IRL | 10.-13.aug.23 | 50m | 4 | 0 | 16 | 0 | 0 | 0 | 696 |

# Landsliðshópar 2022-2023

## NM/NJM 2022 í Bergen, Noregi

**Svimjarar (10)**: Lea Osberg Højsted (2008), Róa Trygvadóttir (2008), Heini M. Askham (2006) og Líggjas Joensen (2008) úr Ægir, Alisa Vestergård (2003), Bjarta í Lágabø (2009 og Róland Toftum (1998) úr SuSvim, Jóhanna Ólavsdóttir (2007) og Bárður Ólavsson (2008) úr FS, og Isak Brisenfeldt (2006) úr HS

**Venjarar**: Kristian Martin Joensen, Astrid B. Joensen og Dánjal Martin Hofgaard

**Ferðaleiðari**: Rúni Gaardbo

## HMS 2022 í Melbourne, Avstralia

**Svimjari (1)**: Vár E. Eidesgaard (2001) úr HS

**Venjari**: Jón Bjarnason

**Ferðaleiðari**: Rókur í Jákupsstovu

## Danish Open 2023 í Keypmannahavn, Danmark

**Svimjarar (13)**: Jonna Joensen (2005), Lea O. Højsted (2008), Heini M. Askham (2006) og Líggjas Joensen (2008) úr Ægir, Elisabeth Erlendsdóttir (2005), Eyðrið Mortensen (2003), Bartal E. Eidesgaard (2003) og Isak Brisenfeldt (2006) úr HS, Jóhanna Ólavsdóttir (2007) úr FS, og Alisa Vestergård (2003), Bjarta í Lágabø (2009), Jón Hofgaard (1992) og Róland Toftum (1998) úr SuSvim

**Venjarar**: Kristian Martin Joensen og Astrid B. Joensen

**Ferðaleiðari**: Rúni Gaardbo

## Sumarmót Íslands 2023 í Reykjavík, Íslandi

**Svimjarar (15)**: Johanna K. Jacobsen (2007), Áki Eliassen (2006), Oddvaldur Leivsson (2008), Silas D. Lindberg (2008) og Villiam M. Samuelsen (2005) úr HS, Birita Vesturtún (2007), Margit Højbro (2007), Rebekka Róðinsdóttir (2007), Bárður Ólavsson (2008) og Fróði Hansen (2008) úr FS, Durita M. Askham (2008), Jonna Joensen (2005), Lea Petersen (2009) og Ragnhild Jacobsen (2008) úr Ægir, og Karl Joensen (2005) úr FLOT

**Venjarar**: Rúni Gaardbo, Malena Hansen og Rúna Jakobsen

**Ferðaleiðari**: Johan M. Thorsteinsson

## NMU 2023 í Jönköping, Svøríki

**Svimjarar (2)**: Bjarta í Lágabø (2009) úr SuSvim og Róa Trygvadóttir (2008) úr Ægir

**Venjari**: Johan M. Thorsteinsson

**Ferðaleiðari**: Rakul í Lágabø

## Oyggjaleikir 2023 á Guernsey

**Svimjarar (10)**: Elisabeth Erlendsdóttir (2005), Eyðrið Mortensen (2003), Bartal E. Eidesgaard (2003) og Isak Brisenfeldt (2006) úr HS, Lea O. Højsted (2008), Heini M. Askham (2006) og Líggjas Joensen (2008) úr Ægir, Alisa Vestergård (2003) og Róland Toftum (1998) úr SuSvim, og Jóhanna Ólavsdóttir (2007) úr FS

**Venjarar**: Kristian Martin Joensen og Dánjal Martin Hofgaard

**Ferðaleiðarar**: Gunnvá Thomsen og Sabina Poulsen

## HM 2023 í Fukuoka, Japan

**Svimjarar (2)**: Elisabeth Erlendsdóttir (2005) úr HS og Líggjas Joensen (2008) úr Ægir

**Venjari**: Jón Bjarnason

**Ferðaleiðari**: Gunnvá Thomsen

## EM U23 2023 í Dublin, Írlandi

**Svimjarar (4)**: Heini M. Askham (2006) og Líggjas Joensen (2008) úr Ægir, Alisa Vestergård (2003) úr SuSvim og Bartal E. Eidesgaard (2003) úr HS

**Venjari**: Petur Heðin á Fløtti

**Ferðaleiðari**: Kirstin á Fløtti

# Føroysk met og juniormet

Føroyskir svimjarar settu 11 føroysk met og 11 føroysk juniormet, hetta svimjiárið 2022-2023, tað vil siga frá 1. september 2022 til 30. august 2023.

Til samanberingar settu føroyskir svimjarar tilsamans 14 føroysk met og 14 føroysk juniormet, undanfarna svimjiárið 2021-2022.

## Føroysk met

| Teinur | Grein | Hylur | Kyn | Tíð | Svimjari | Aldur | Felag | Stevna | Dagur | Land |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4x50 | Frí | 25m | Mix | 01:42.33 | Bartal E. Eidesgaard<br>Eyðrið Mortensen<br>Vár E. Eidesgaard<br>Isak Brisenfeldt | 2001 | HS | FM | 2022-11-11 | FRO |
| 400 | Frí | 25m | F | 04:14.09 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | FM | 2022-11-12 | FRO |
| 4x100 | Blandað | 25m | Mix | 04:05.36 | Eyðrið Mortensen<br>Bartal E. Eidesgaard<br>Isak Brisenfeldt<br>Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | FM | 2022-11-12 | FRO |
| 4x100 | Frí | 25m | Mix | 03:45.58 | Vár E. Eidesgaard<br>Eyðrið Mortensen<br>Isak Brisenfeldt<br>Bartal E. Eidesgaard | 2001 | HS | FM | 2022-11-13 | FRO |
| 50 | Bringa | 25m | Mix | 00:28.30 | Róland Toftum | 1998 | SuSvim | NM | 2022-12-11 | NOR |
| 100 | Frí | 25m | F | 00:56.21 | Vár. E. Eidesgaard | 2001 | HS | HMS | 2022-12-14 | AUS |
| 50 | Bringa | 50m | F | 00:34.31 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | RIG | 2023-01-27 | ISL |
| 50 | Bringa | 50m | M | 00:29.36 | Róland Toftum | 1998 | SuSvim | RIG | 2023-01-29 | ISL |
| 50 | Bringa | 50m | F | 00:34.01 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | DO | 2023-04-03 | DEN |
| 100 | Bringa | 25m | F | 01:11.47 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | AO | 2023-04-15 | FRO |
| 50 | Rygg | 25m | F | 00:28.49 | Elisabeth Erlendsdóttir | 1995 | HS | OyL | 2023-07-13 | GBR |

## Føroysk juniormet

| Teinur | Grein | Hylur | Kyn | Tíð | Svimjari | Aldur | Felag | Stevna | Dagur | Land |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4x100 | Blandað | 25m | Mix | 04:16.83 | Líggjas Joensen<br>Lea O. Højsted<br>Jonna Joensen<br>Heini M. Askham | 2005 | Ægir | FM | 2022-11-12 | FRO |
| 4x200 | Frí | 25m | M | 07:58.23 | Isak Brisenfeldt<br>Bárður Ólavsson<br>Heini M. Askham<br>Líggjas Joensen | 2006 | SSF | NM | 2022-12-10 | NOR |
| 50 | Bringa | 50m | F | 00:34.31 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | RIG | 2023-01-27 | ISL |
| 50 | Bringa | 50m | F | 00:34.01 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | DO | 2023-04-03 | DEN |
| 100 | Bringa | 25m | F | 01:11.47 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | AO | 2023-04-15 | FRO |
| 4x100 | Frí | 25m | Mix | 03:47.23 | Líggjas Joensen<br>Heini M. Askham<br>Róa Trygvadóttir<br>Lea O. Højsted | 2006 | Ægir | AO | 2023-04-15 | FRO |
| 4x100 | Blandað | 25m | Mix | 04:16.07 | Líggjas Joensen<br>Lea O. Højsted<br>Jonna Jonesen<br>Heini M. Askham | 2005 | Ægir | AO | 2023-04-16 | FRO |
| 200 | Firvald | 50m | M | 02:10.86 | Isak Brisenfeldt | 2006 | HS | SO | 2023-05-20 | FRO |
| 4x100 | Frí | 50m | Mix | 03:55.61 | Lea O. Højsted<br>Heini M. Askham<br>Líggjas Joensen<br>Róa Trygvadóttir | 2006 | Ægir | FM | 2023-06-16 | FRO |
| 200 | Firvald | 50m | M | 02:09.66 | Isak Brisenfeldt | 2006 | HS | FM | 2023-06-18 | FRO |
| 200 | Firvald | 25m | M | 02:03.70 | Isak Brisenfeldt | 2006 | HS | OyL | 2023-07-10 | GBR |

# Havsvimjing

Nakað av havsvimjing var hetta svimjiárið, við Ólavsøkusvimjingini hjá HS og við Svimjingini um Vánna hjá Ægir á Sjómannadegnum.

# Svimjiárið 2023-2024

## AQUA stevnur í føroyskum svimjihallum

Føroysk svimjifeløg og SSF hava til nú, hetta svimjiárið, skipað fyri tilsamans 8 AQUA-góðkendum svimjistevnum í svimjihallum, harav 2 meistarastevnum, har málbólkurin vóru føroysk børn, ung og vaksin.

| Stevna | Staður | Dagfesting | Hylur | Kapp. | Feløg | Íðkarar | Lið | Úrslit | AQUA |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| HS Open | Tórshavn | 30.sep-1.okt.23 | 25m | 42 | 6 | 81 | 20 | 529 | 645 |
| Ægir Open | Klaksvík | 21.-22.okt.23 | 25m | 36 | 5 | 108 | 0 | 588 | 696 |
| FMS/JMS | Tórshavn | 10.-12.nov.23 | 25m | 86 | 4 | 64 | 53 | 580 | 105 |
| ABMS Sprint | Klaksvík | 18.nov.23 | 25m | 28 | 6 | 186 | 28 | 729 | 518 |
| HS Jólasprint | Tórshavn | 16.des.23 | 25m | 31 | 4 | 74 | 17 | 317 | 575 |
| SuSvim Open | Vágur | 13.-14.jan.23 | 50m | 38 | 4 | 65 | 10 | 408 | 631 |
| Ægir Open | Klaksvík | 17.-18.feb.23 | 25m | 51 | 6 | 83 | 21 | 560 | 706 |
| SuSvim Open | Vágur | 16.-17.mar.23 | 50m | 38 | 4 | 60 | 13 | 393 | 680 |

## Aðrar stevnur í føroyskum svimjihallum

Føroysk svimjifeløg hava hartil til nú skipað fyri 6 stuttleikastevnum, hetta svimjiárið, fyri okkara yngstu aldursbólkar: SuSvim-stevna í Páls Høll 28. okt. 23 (har tey svumu breiddir), FS-stevna í Fuglafirði 2. des. 23, FLOT-stevna á Toftum 3. feb. 24, HS-stevna á Argjum 24. feb. 24, SuSvim-stevna í Páls Høll 9. mar. 22 (har tey svumu breiddir), og Reysta-stevna í Leirvík 6. apr. 24.

Ein stevna mátti avlýstast vegna tekniskar trupulleikar: HS-stevna á Argjum 23. sep. 23

# Uttanlanda og altjóða stevnur

Landslið SSF hava til nú luttikið á 3 uttanlanda og altjóða svimjistevnum, hetta svimjiárið, umframt at feløg hava luttikið í øllum førum á Køge Open 2023 og Reykjavík International 2024, og at Elisabeth Erlendsdóttir og Vár E. Eidesgaard ísv skúla- og venjingaruppihald í USA kappast har.

| Stevna | Land | Dagfesting | Hylur | Íðkarar | Lið | Úrslit | Gull | Silvur | Bronsa | AQUA |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| World Cup 23 | GER | 6.-8.okt.23 | 50m | 4 | 0 | 12 | 0 | 0 | 0 | 703 |
| NM/NJM 23 | EST | 1.-3.des.23 | 25m | 13 | 6 | 73 | 0 | 0 | 2 | 734 |
| HM 24 | QAT | 11.-18.feb.24 | 50m | 1 | 0 | 2 | 0 | 0 | 0 | 692 |

# Landsliðshópar 2023-2024

## World Cup 2023 í Berlin, Týsklandi

**Svimjarar (4)**: Lea O. Højsted (2008), Róa Trygvadóttir (2008) og Líggjas Joensen (2008) úr Ægir, og Bartal E. Eidesgaard (2003) úr HS

**Venjari**: Rúni Gaardbo

**Ferðaleiðari**: Rúna Jakobsen

## NM/NJM 2023 í Tartu, Estlandi

**Svimjarar (13)**: Lea Osberg Højsted (2008), Lea Petersen (2009), Róa Trygvadóttir (2008), Heini M. Askham (2006) og Líggjas Joensen (2008) úr Ægir, Bartal E. Eidesgaard (2003), Isak Brisenfeldt (2006), Oddvaldur Leivsson (2008) og Silas D. Lindberg (2008) úr HS, Jóhanna Ólavsdóttir (2007), Bárður Ólavsson (2008) og Fróði Hansen (2008) úr FS, og Bjarta í Lágabø (2009) úr SuSvim

**Venjari**: Kristian Martin Joensen og Rúni Gaardbo

**Ferðaleiðari**: Rúna Jakobsen

Eitt serligt í sambandi við hesa luttøku, var nýtt samstarv við Parasport Føroyar, har tey luttóku saman við okkum. Teirra vóru svimjarin Andrias Mellemgaard (2009) og venjari Bjørg Ólavsdóttir.

## HM 2024 í Doha, Katar

**Svimjari (1)**: Líggjas Joensen (2008) úr Ægir

**Venjari**: Rúni Gaardbo

**Ferðaleiðari**: Sabina Poulsen

# Føroysk met og juniormet

Føroyskir svimjarar hava til nú sett 1 føroysk met og 8 føroysk juniormet hetta svimjiárið 2023-2024, tað vil siga frá 1. september 2023 til 30. august 2024. Til samanberingar settu føroyskir svimjarar tilsamans 11 føroysk met og 11 føroysk juniormet, undanfarna svimjiárið 2022-2023.

## Føroysk met

| Teinur | Grein | Hylur | Kyn | Tíð | Svimjari | Aldur | Felag | Stevna | Dagur | Land |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 100 | Bringa | 25m | M | 01:02.19 | Bartal E. Eidesgaard | 2003 | HS | NM | 2023-12-01 | NOR |

## Føroysk juniormet

| Teinur | Grein | Hylur | Kyn | Tíð | Svimjari | Aldur | Felag | Stevna | Dagur | Land |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4x50 | Frí | 25m | Mix | 01:43.58 | Jonna Joensen<br>Líggjas Joensen<br>Heini M. Askham<br>Róa Trygvadóttir | 2005 | Ægir | FM | 2023-11-10 | FRO |
| 4x100 | Frí | 25m | M | 03:39.03 | Áki Eliassen<br>Oddvaldur Leivsson<br>Silas D. Lindberg<br>Isak Brisenfeldt | 2006 | HS | FM | 2023-11-10 | FRO |
| 4x200 | Frí | 25m | M | 07:38.99 | Isak Brisenfeldt<br>Líggjas Joensen<br>Heini M. Askham<br>Fróði Hansen | 2006 | SSF | NM | 2023-12-01 | EST |
| 200 | Firvald | 25m | M | 02:03.62 | Isak Brisenfeldt | 2006 | HS | NM | 2023-12-02 | EST |
| 4x100 | Blandað | 25m | M | 04:00.82 | Oddvaldur Leivsson<br>Heini M. Askham<br>Isak Brisenfeldt<br>Líggjas Joensen | 2006 | SSF | NM | 2023-12-02 | EST |
| 4x100 | Frí | 25m | M | 03:35.18 | Isak Brisenfeldt<br>Líggjas Joensen<br>Heini M. Askham<br>Oddvaldur Leivsson | 2006 | SSF | NM | 2023-12-03 | EST |
| 200 | Firvald | 50m | M | 02:09.50 | Isak Brisenfeldt | 2006 | HS | RIG | 2024-01-27 | ISL |
| 200 | Firvald | 50m | F | 02:27.69 | Jóhanna Ólavsdóttir | 2007 | FS | RIG | 2024-01-28 | ISL |

# Gongdin við FM

Meistarastevnur SSF hava hesi seinastu 10 árini verið fyri munandi broytingum, tá ið tað kemur til serliga dagseting og ískoyti av øðrum stevnum, umframt nú í seinastuni, um KVF vildi senda.

Upprunaliga høvdu vit bara 3 meistarastevnur í vanliga svimjiárinum, men vóru vit í 2022 uppi at venda á 7 meistarastevnum, harav tann eina var norðurlendsk.




'Flaggskipið' var upprunaliga Føroyameistarastevnan (FM), sum í 2016 fekk afturat sær FM á langgeil, og sum síðani varð flutt til at vera í november, enntá við tveimum FM í 2017.

Vegna avmarkingina til bara føroyskar íkarar á FM, hava vit síðani 2019 roynt okkum við eisini Atlantic Open, har tankin var at fáa eisini útlendskar íðkarar til Føroyar at kappast.

Masters-stevnan FOMM varð strikað aftaná 2018, tí at trupult var at finna nakran at skipa fyri henni. Og so hava vit gjørt onkrar royndir afturat, t.d. við FM fyri lið í 2022, og ABMS Sprint í 2022 og 2023.

Og so var sjálvsagt korona eisini, ið ávirkaði 2020 og 2021.

Spurningurin hevur tí ofta verið, hvussu hetta ávirkaði talið av luttakarum, umframt bestu avrik á hesum flaggskipi okkara, sum til at kunna samanbera enn er árliga FM á stuttgeil.

Til nú sær tað út til at luttøkan er rættiliga stabil:




Og tað er topp-støðið eisini, um hugt verður at bestu AQUA-stig:




Spurningurin er so sjálvsagt, um 'stabilt' er nóg gott, tá ið endamálið er at mennast.

Men nú koma nýggjar hallir, í Havn og í Runavík, sum vælsagtans fara at hava sína ávirkan.

# Gongdin við landsliðnum

Tá ið SSF í 2021 skifti til at vilja royna seg við føstum landsliðsvenjara aftur, var tað tí at vit høvdu afturvendandi avbjóðingar við skipanini har allir venjararnir vóru á skift úr feløgunum.

Støðugu útskiftingarnar viðførdu í heilum miskiljingar í sambandi við landsliðsferð, og var tað hartil trupult at fáa í lag annað landsliðsvirksemi, so sum serliga landsliðslegur.

Hartil høvdu úrslitini í eina tíð verið einki at reypa av, tá ið man hugsar um hvussu væl úttiknu svimjararnir svumu á landsliðsferð, í mun til støði teirra annars.

Starvsnevndin samtykti tá at vilja seta ein landsliðsvenjara, og at vilja spyrja Kristian Martin Joensen, vegna tann profil sum hann hevur millum føroysk boð uppá ein slíkan venjara.

Vit sóu beinanvegin ein bata, men hava tað tó so verið afturvendandi avbjóðingar, sum viðførdu at vit í leypi av 2023 fingu hug at royna okkum við einum landsliðstoymi, heldur enn éinum venjara.

Og nú gongur væl frægari, um hugt verður at hvussu nógvir svimjarar seta bestu tíð á landsliðsferð, umframt at hvussu vit kláraðu okkum serliga á Oyggjaleikum og NM/NJM 2023.

Myndin her vísir hvussu nógvir svimjarar sum hava betrað seg á landsliðsferð, umframt hvussu nógv av øllum úrslitunum tilsamans vóru betri á landsliðsferð, síðani 2018:




Tað er týðiligt at vit høvdu eina kreppu í 2018 og serliga 2019, umframt koronaárið 2020, sum nú er bøtt uppá. Landsliðstoymið skapar ikki úrslitini, men hjálpir til at tey kunnu koma á landsliðsferð.

# Annað virksemi 2022-2024

## Umboðan á fundum í Føroyum og uttanlanda

SSF luttekur so vítt gjørligt altíð á teimum pallum, har vit væntast at luttaka, so sum hjá ÍSF, í norðurlendska svimjisambandinum NSF, í norðurlendska lívbjargingarbólkinum NLSG, í evropeiska svimjisambandinum LEN, í altjóða svimjisambandinum World Aquatics (AQUA, fyrr FINA), umframt nú eisini í evropeiska lívbjargingarsambandinum ILSE og altjóða lívbjargingarsambandinum ILS.

Í tíðarskeiðnum síðani seinasta aðalfund, vóru tiltøkini í øllum førum:

- 12. apríl 2023: ÍSF umboðsting í Tórshavn
- 29. apríl 2023: ÍSF aðalfundur í Tórshavn
- 29. apríl 2023: ÍSF ítróttating í Tórshavn
- 3. - 4. mai 2023: NSF-venjarafundur í Stockholm, Svøríki
- 24. juli 2023: LEN-fundur í Fukuoka, Japan
- 25. juli 2023: AQUA aðalfundur í Fukuoka, Japan
- 15. september 2023: NSF ársfundur í Funchal, Madeira
- 16. september 2023: LEN aðalfundur í Funchal, Madeira
- 7. november 2023: ÍSF umboðsting í Tórshavn
- 10. - 11. november 2023: LEN svimjiførleikaráðstevna í Jurmala, Lettandi
- 10. - 11. januar 2024: NSF-aðalskrivarafundur í Keypmannahavn
- 16. januar 2024: Fundur á netinum um ætlaða Úrval
- 26. januar 2024: NSF val-fundur í Athen, Grikkalandi
- 27. januar 2024: LEN val-aðalfundur í Athen, Grikkalandi
- 22. februar 2024: ÍSF verkstova um 'safeguarding' í ítrótti
- 27. februar 2024: NLSG-fundur á netinum
- 19. mars 2024: ÍSF-kunningarfundur um Úrval

Afturat hesum hava verið ymiskir smærri fundir á netinum, í Føroyum ella á ferð, eftir tørvi t.d. í sambandi við nýggju strategi LEN, og um kunning t.d. ísv ætlaðu Føroyaleikir.

# Onnur SSF-tiltøk

SSF roynir eftir førimuni at skipa fyri stimbrandi tiltøkum í Føroyum og fyri føroyingar, afturat sjálvum svimjistevnunum, til at betra um samstarv og førleikar hjá okkum innan svimjingini, og til at vaksa um áhugan fyri svimjing sum heild.

Í tíðarskeiðnum síðani seinasta aðalfund, vóru tiltøkini í øllum førum:

- 1. juli 2023: Landsliðslega í Tórshavn
- 29. - 30. september 2023: Forfólkafundur í Tórshavn
- 24. - 25. november 2023: Landsliðslega í Tórshavn
- 7. januar 2024: Forfólkafundur í Tórshavn
- 9. - 10. februar 2024: Talentlandsliðslega í Fuglafirði
- 10. februar 2024: Kalendarafundur í Tórshavn
- 2. mars 2024: Landsliðslega í Vági - avlýst

# Stutt um okkara limaskapir

## ÍSF

ÍSF skipar tvær ferðir um árið fyri umboðstingum, har formenn og -kvinnur í sersambondunum møtast til at viðgera ymisk viðurskifti, ímillum árligu aðalfundir. Hetta seinasta árið hevur viðgerðin verið serliga um m.a. nýggju strategi ÍSF, um ætlaða ÍSF-húsið, um býtislykil og puljur, og um Úrval. Hartil plaga vit at fundast árliga við fíggjarnevnd ÍSF, har fundurin til í ár tó varð avlýstur.

## NSF

SSF yvirtók í 2021 forfólksskapin í norðurlendska svimjisambandinum NSF, á ársfundi hin 24. september. Nógv virksemi var okkara tíðarskeið, vegna nýggja LEN, broytingar hjá AQUA, umframt russisku innrásina í Ukraina. Fundirnir hava verið serliga á netinum, umframt fysiskir tá ið høvi beyðst. Danmark yvirtók sum siður er forfólkaskapin á NSF-ársfundinum í september 2023

## LEN

Undirritaði SSF-formaður er síðani februar 2022 bureaulimur í LEN, við ábyrgd fyri serliga miðlan og svimjiførleika. Hetta eru spennandi uppgávur, har vit millum annað hava umskipað miðladeildina og skift út heimasíðuna, og ísv svimjiførleika hava tilevnað ein evropeiskan standard fyri vatntryggleika og svimjiførleika, sum varð vístur fram á fyrstu svimjiførleikaráðstevnu okkara í 2023.

Afturmeldingarnar hava verið góðar, til okkum sum nú vara av evropeiska svimjisambandinum, og vórðu vit tí eisini einmælt afturvald á val-aðalfundinum í januar 2024. Undirritaði heldur áfram við somu ábyrgdarøkjum, umframt nú eisini at byggja upp eitt dátusavn til evropeiska svimjing.

## AQUA

Í altjoða svimjisambandinum World Aquatics (AQUA, fyrr FINA) varð nýggjur forseti valdur á kongressini í Doha í juni 2021, sum viðførdi útskiftingar í leiðsluni umframt munandi broytingar í, hvussu hesin altjóða felagsskapur nú virkar.

Serliga er evstalógin rættiliga umfatandi broytt, til millum annað at skula tryggja betri javnstøðu og møguleika hjá íðkarum at verða hoyrdir og hava ávirkan. Umframt at 'good governance' av álvara er komið á breddan, við støðugt vaksandi krøvum til eisini okkum limalond.

Í 2022 samtyktu vit í SSF t.d. vegna hetta governance-átak eina etiska reglugerð umframt reglugerð til fyribyrging av ágangi og misbrúki, her enn er eftir at fáa í lag etiska nevnd og varskógvaralinju.

### ILS/ILSE/NLSG

Í altjóða lívbjargingini hevur aftur í ár verið rættiliga friðarligt, soleiðis sum vit hava upplivað tað síðani koronufarsóttina. Altjóða ráðstevnan sum skuldi vera í Sri Lanka á heysti í 2022, varð flutt til Avstralia í desember 2023, og valaðalfundurin til í 2024. Í norðurlendska partinum NLSG hevur eisini verið friðarligt, men var ein netfundur tó nú í februar 2024, sum serliga snúði seg um komandi val.

## Onnur tiltøk

### Úrval

Úrval játtaði til 2022 oyramerktan stuðul til hesar hesar 2 svimjarar: Vár E. Eidesgaard (2001) og Elisabeth Erlendsdóttir (2005). Hinvegin varð einki játtað til '15 tey næstbestu'.

Til 2023 játtaði Úrval aftur oyramerktan stuðul til hesar 2 svimjarar: Vár E. Eidesgaard (2001) og Elisabeth Erlendsdóttir (2005). Harumframt aftur játtan til '15 tey næstbestu'.

Umsitingarvirksemið hevur verið tungt, vegna broyttar ætlanir og misskiljingar millum Úrval, SSF og viðkomandi íðkarar. ÍSF ætlar nýggja skipan, sum fer at leggja meira út til sambandið at umsita.

### AQUASP

SSF hevur síðani 2018 fingið fíggjarligan stuðul frá altjóða svimjisambandinum World Aquatics (AQUA, fyrr FINA), til menning fram ímóti OL. Fyrstu árini royndu vit at byggja upp eina test-protokoll, áðrenn vit frá umleið 2021, vegna avbjóðingar, skiftu til heldur at søkja um stuðul til sovorðið sum var so gott sum fullvíst at verða gjøgnumført, so sum útreiðslur til stevnuskipanir, og luttøka á Bergen Swim Festival 2022 og Danish Open 2023.

Til í 2023 kravdi World Aquatics nú afturat, at vit millum annað skulu brúka pengar uppá 'good governance', umframt til virksemi sum var beinleiðis til gagns fyri íðkararnar.

Vit hava søktu tí um stuðul til hesi tiltøk í 2023, og fingu játtan frá World Aquatics:

1) SSF ráðstevna um good governance
2) Hald (forrit) ísv stevnuforrit okkara (Tempus, WinGrodan, SwimRankings)
3) Útbúgving av nýggjum yvirdómarum
4) Hald (forrit) og menning av okkara stroymingar- og upptøkuloysn
5) Ungdómslandsliðslegur
6) Luttøka á uttanlanda stevnu við ungdómslandsliðnum

Stuðulin frá AQUA var USD 15.000 í 2022, har hann til í 2021 var USD 20.000. Orsøkin til hesa minking var, at AQUA í september 2021 innførdi eina røð av krøvum til 'good goverance', har vit vóru mett til at vera á 'basic' støði, ið gevur USD 15.000. Vegna ábøtur serliga á aðalfundi SSF í 2022, umframt virksemi annars til at bøta um okkara 'governance', megnaðu vit at flyta okkum upp á 'advanced' støði, sum útloysti USD 30.000 í stuðli til í 2023, og síðani aftur USD 25.000 til í 2024

## AQUA Mentorship verkætlan

AQUA bjóðaði okkum á vári 2022 at verða 1 av 10 londum í eini nýggjari 'mentorship' verkætlan, til at styrkja um 'good governance'. Vit tóku av og luttóku við aðalskrivara og formanni á verkstovu ísv HM í Budapest í juni 2022, fyri síðani at arbeiða víðari sjálvi og saman við AQUA og hinum luttakandi londum á netfundum, áðrenn framløgu ísv HMS í Melbourne í desember.

Hetta var áhugavert og gevandi, serliga tí at eksterni konsulenturin hjá AQUA sum væntað var sera kompetentur, og tí at vit her fingu tætt samband við lyklapersónar hjá AQUA. Ítøkuliga úrslitið er strategiin, sum vit saman við feløgum okkara tilevnaðu á strategidøgunum í september 2022, og síðani royna at dagføra og halda okkum til, við framløgu til dømis á forfólkafundi í september 2023.

## World Drowning Prevention Day

Altjóða lívbjargingarsambandið ILS heitir á okkum limalond, um at seta sjóneykuna á World Drowning Prevention Day, sum ST í 2021 samtykti at skula vera árliga hin 25. juli. Í 2022 gjørdu vit nógv burturúr, við bláum ljósi í undirsjóvartunlum og á bygningar, við lýsingum á stórskíggjum runt um í landinum, við bási í SMS, og við serligu heimasíðuna druknifyribyrging.fo. Síðst í juli er tó sera óheppið tíðspunkt fyri okkum, og var tí eingin endurtøka í 2023, eins og 2024 eisini er ivasamt.

## Útbúgving

Í mars 2022 fingu vit endiliga útbúgvið ein hóp av dómarum aftur, aftaná eitt tíðarskeið har serliga korona órógvaði. Formlig avtala er við Dansk Svømmeunion, sum viðførdi eitt væleydnað dómaraskeið í mars 2022, umframt eitt líka væleydnað lívbjargingardómaraskeið í september 2022.

Verri hevur verið við venjaraskeiðum, har tað ikki eydnaðist at fáa nóg nógv at melda til ætlaða AQUA hjálparvenjaraskeið í september 2022, eins og til AQUA dómaraskeið, sum viðførdi at AQUA segði nei til at bjóða okkum skeið aftur í 2023 og 2024.

Tað hevur eisini verið trupult at fáa fólk at melda til okkara egnu skeið í Merkjaskipanini, og er tað virksemið tí mestsum dottið niðurfyri her hjá okkum, líka undantikið skeiðið hjá Hellufossi.

Men, í 2022 fóru vit undir samstarv við Fróðskaparsetur Føroya, at bjóða skeið í Merkjaskipanini og í lívbjargingarskipanini til læraralesandi og námsfrøðislesandi, og varð tað tí gjøgnumført í fleiri umførum í 2022 umframt væntandi at verða tað aftur nú í 2024. Hetta er sjálvsagt sera jaligt, at koma mestsum inn í skúlaskipanina við okkara svimjiførleika- og lívbjargingarskipanum.

## Tøkni

SSF mennir javnt og samt um sínar tøkniligu skipanir, til at lætta um hjá okkum og øðrum í felagsskapinum, væl vitandi at tað serliga er arbeiðskraftin, sum er fløskuhálsur í føroyskari svimjing. Í 2021 var stevnuskipanin Tempus okkara stóra íløga, har keypið tí eisini varð lagt fyri sjálvan aðalfundin at góðkenna, og har royndirnar nú tíbetur hava verið sera góðar.

Nú er nógv lættari hjá luttakandi feløgum at melda til svimjistevnur, og nógv færri trupulleikar av væntandi tilmeldingum. Samstundis hava fyriskiparar og SSF fingið betri amboð til at seta upp stevnur og fylgja við; og øll føroysk svimjiúrslit verða nú skrásett eisini har til framtíðar uppslag og greining, ið aftur kann brúkast til dømis til úttøku av landsliðum og vísing av styrkislistum.

Til í 2022 og 2023 høvdu vit sum so ongar aðrar ætlanir við tí tøkniliga, enn at styrkja um hesar loysnir ið rigga, og at áhaldandi royna at minka um kompleksitetin. Serliga loysnin til stroyming og videoupptøku er viðkomandi, til at vísa fram okkara ítrótt, og vónandi upp á sikt gera tilfar til at lætta um frálæruna í svimjing og lívbjarging. Hendan støða er sum so óbroytt, eisini nú til í 2024.

## Antidoping

Føroysk svimjing tekur sjálvsagt fult undir við miðvísa arbeiðinum hjá ÍSF saman við Antidoping Danmark og øðrum at basa møguligari doping í ítrótti. Tí hava vit eisini eftir áheitan frá ÍSF lagt hendan boðskap út á heimasíðu okkara, við leinki til viðkomandi myndugleikar.

## GDPR

Í 2021 kom nýggja løgtingslógin um vernd av persónupplýsingum í gildi, sum eisini vit ítróttarsambond og -feløg mugu halda okkum til. Tað kom kanska eitt sindur knappliga á breddan, men er tað við at koma undir húðina, at minka um og ansa eftir persónligum upplýsingum.

## Breidd

Í desember 2021 skipaði SSF endiliga fyri einum rættiligum breiddartiltaki aftur, tá ið vit sjósettu svimjiførleikaátakið “Klárar tú 200?”, við sjálvum løgmanni sum fyrsta svimjara, og við góðari hjálp

frá svimjihallum og eldsálum runt landið. Tilsamans vóru tey knøpp 1400, sum svumu seg til hesa nál, at prógvað, at tey eru svimjarar. Avgerð er ikki enn tikin um møguliga endurtøku.

## Svimjiførleiki

Í 2021 gjøgnumførdu vit eina svimjiførleikakanning, sum vit tíverri ikki enn hava haft stundir at greina, har vaksin vórðu spurd umvegis Gallup-kanning, og har øll fimtafloksbørn í Føroyum vórðu spurd við spurnarbløðum í skúlunum. Tilfarið er komið á teldu, men væntar enn tíð til greiningina.

## Svimjihallir

Umboð fyri SSF eru í fyrireikingarbólkum bæði í sambandi við ætlaða langhylin í Tórshavn, og við ætlaða stutthylin í Runavík. Hetta er virksemi, sum krevur tol, men komu vit á heysti 2020 til tað stóru løtu, at byrjað var uppá langhylin í Tórshavn. Eftir ætlan stendur hann vónandi klárur í 2024, meðan tann í Runavík væntandi verður liðugur fyrst í 2025.

## Skrivstova hjá ÍSF

Sum avleiðing av byrjanini uppá langhylin í Havn, var ÍSF-húsið tikið niður á heysti í 2020, ið so aftur viðførdi, at SSF vegna goymslutørv flutti til góðar umstøður hjá Runavíkar kommunu í Saltangará. Har eru vit enn, eisini hóast møguleiki er at flyta í nýggju fyribilsloysn hjá ÍSF á Eystara Bryggju í Havn. Serliga goymsluplássið er kærkomið, í Saltangará.

## Safeguarding

Vegna nýggj krøv um serliga barnaváttanir, og krøv og ynski til yvirhøvur at betra um trygd og trivnað, so royna vit alsamt at betra um hesi viðurskifti. Allir venjarar og leiðarar hava nú barnaváttan, sum luttaka á landsliðsferðum, óansæð aldur á teimum á ferð; og vit royna sum heild at styrkja um tær avtalur vit hava við hesi sum taka ábyrgd vegna SSF á uppgávum okkara.

## Stuðlar

Høvuðsstuðul hjá Svimjisambandi Føroya er Atlantic Airways, sum hevur verið hollur stuðul í nú mong ár. Hartil hava vit nógvar aðrar trúgvar stuðlar serliga í sambandi við okkara meistarastevnur, umframt at fáa góðan stuðul frá teimum kommunum og felagsskapum, sum vit nú einaferð hoyra til. Til lívbjargingarátakið fingu vit hollan stuðul frá serliga Betri stuðulsgrunninum, og njóta vit gott av tí holla stuðli, sum vit fáa frá Løgtinginum og Veddingini umvegis ÍSF, umframt frá stuðulsskipanum ÍSF og Úrvals, og frá stuðulsskipanunum hjá World Aquatics og LEN.

# Niðurløga

Hetta var so mítt tíggjunda ár sum formaður SSF, ella 9½ um vit taka við, at vit í 2018 fluttu aðalfundin frá at vera um heystið, til í staðin at vera aftur longu um várið í 2019.

Tað tykist sum eitt langt hál, at royna at fyriskipa hetta ymiska sum vit plaga at gera, samstundis sum nýtt legst afturat so hvørt til okkum at skula fyrihalda okkum til.

Yvirhøvur eru vit í eini broytingartíð, har mestsum øll endurskoða sítt virksemi, við revidering av reglugerðum og mannagongdum, og við nýggjum krøvum sum yvirhøvur krevja meira umsiting.

Og so komu sera jaligu boðini, á jólum 2023, at Føroyar verða vertir fyri Oyggjaleikum í 2027. Hetta fer at krevja nógv av okkum, og eru vit tí eisini beinanvegin farin undir fyrireikingina.

Eitt sum tykiskt greitt, er at tíðin er við at vera farin frá felagsskapinum har fólk finna løtur í sínari frítíð til at gera hetta ymiska fyri SSF. Og eitt sum tí er fyrst fyri, er at fáa sett ein aðalskrivara.

Men viðkomandi fer ikki at kunna gera alt, og er líka stórur tørvur tí á at umhugsa onnur fólk afturat, til at betra um ymisku uppgávur okkara, innan kapping, lívbjarging, svimjiførleika og annað.

Eitt sum vit hartil næstan ikki tora at nevna í Føroyum, er tørvurin á at víðka til hinar vatnítróttirnar undir AQUA. Trupulleikin hevur verið plásstrot í hallunum, men har verður so nakað væl frægari nú.

Svimjingin eigur at vaksa nógv, nú stásiligar hallir verða bygdar í Havn og í Runavík. Fløskuhálsurin verður væntandi fólk so sum serliga venjarar, men man tann trupulleikin fara at batna við tíðina.

Og so er tað ‘good governance’ og ‘safeguarding’, har vit enn hava nakað væl á mál, hóast betringar hesi seinastu árini. Eitt stórt øki til okkum fáu, har skipanin tí má vera so smidlig sum gjørligt.

Eina hjartans tøkk til tykkum mongu sum hjálpa til við øllum hesum ymiska, sum vit fáast við í føroysku svimjingini. Tit vita hvørji tit eru, og at tað sum tit gera, ger mun.

Bestu eydnu í komandi ári.

við svimjikvøðu,

Saltangará 7. apríl 2024
Rókur í Jákupsstovu